# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 10.05.2023 |
| Mál nr.: | 23/01350 |
| Málsviðgjørt: | AKSS/BÁT |
| Ummælistíð: | 10.05.2023-09.06.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**Brekumboð**

*Heimild*

**§ 1.** Landsstýrismaðurin fær við hesi løgtingslóg heimild til at seta á stovn eitt brekumboð.
*Stk. 2.* Umframt Brekumboðið setur landsstýrismaðurin eina nevnd, sum skal ráðgeva Brekumboðnum.
*Stk. 3.* Brekumboðið er óheft í virki sínum.

*Brekumboðið*

**§ 2.** Brekumboðið kann frítt úttala seg um viðurskifti innan tess virkisøki.
*Stk. 2.* Brekumboðið kann bert úttala seg um yvirskipaði viðurskiftir, og ikki um viðurskifti hjá einstaklingum.
*Stk. 3.* Brekumboðið kann bert úttala seg og kann ikki taka avgerðir.

**§ 3.** Brekumboðið skal:
1) Hava eftirlit við at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við ST sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.
2) Veita ráð og vegleiðing til fólk, ið bera brek, um teirra rættindi og kærumøguleikar.
3) Veita ráð og vegleiðing til almennar myndugleikar, almennar og privatar stovnar og fyritøkur, fakfeløg og áhugafeløg um spurningar viðvíkjandi rættindum og kærumøguleikum hjá fólki, ið bera brek.
4) Veita kunning og frálæru við tí endamáli at ala fram virðing fyri rættindum hjá fólki, ið bera brek.
5) Gera frágreiðingar og kanningar um viðurskifti hjá fólki, ið bera brek.
6) Gera røddina hjá fólki, ið bera brek, týðiligari í almenna rúminum og birta kjak um viðkomandi spurningar, sum viðvíkja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

*Stk. 2.* Brekumboðið skal, í tann mun tað er viðkomandi og møguligt, hoyra fólk, ið bera brek, og áhugafeløg á brekøkinum.

**§ 4.** Brekumboðið skal geva landsstýrinum og Løgtinginum ummælissvar og ráðgeving í sambandi við lógararbeiði og onnur átøk, sum hava týdning fyri viðurskifti hjá fólki, ið bera brek.

**§ 5.** Brekumboðið ger á hvørjum ári eina ársfrágreiðing um sítt virksemi. Frágreiðingin skal almannakunngerast og latast landsstýrinum, Løgtinginum, Kommunufelagnum og nevndini fyri Brekumboðið.

**§ 6.** Brekumboðið verður sett fyri fimm ár í senn, tó í mesta lagi átta ár tilsamans.
*Stk. 2.* Brekumboðið skal hava:

1) Góðan kunnleika til lógir og skipanir.
2) Góðan kunnleika til viðurskifti sum eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek.
3) Útbúgving á kandidatstøði ella líknandi.

*Stk. 3.* Brekumboðið kann verða loyst úr starvi, um:

1) Brekumboðið vanrøkir uppgávurnar, sum sambært lógini eru lagdar til Brekumboðið, ella
2) Brekumboðið ber seg at á ein hátt, sum týðiliga minkar um álitið á, at Brekumboðið kann røkja uppgávur sínar á fullgóðan hátt, ella
3) Tríggir av limunum í nevndini fyri Brekumboðið mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi.

*Stk. 4.* Um ein av treytunum í § 6, stk. 3 er lokin kann landsstýrismaðurin loysa Brekumboðið úr starvi.

*Fyrisiting*

**§ 7.** Brekumboðið setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.
*Stk. 2.* Starvsfólkini røkja dagligu uppgávurnar saman við Brekumboðnum.
Stk. 3. Brekumboðið kann taka serligan sakkunnleika við í arbeiði sítt.

*Nevndin fyri Brekumboðið*

**§ 8.** Nevndin fyri Brekumboðið hevur fimm limir og fimm varalimir, sum landsstýrismaðurin tilnevnir eftir tilmæli frá niðanfyri nevndu: ein umboðandi áhugafeløg á brekøkinum, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og tveir umboðandi almanna-, heilsu-, skúla-, dagstovna- og eldraøkið og frítíðarvirksemi.
*Stk. 2.* Tey, ið verða tilnevnd í nevndina skulu hava breitt innlit í tað økið tey umboða, eins og í viðurskifti sum eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek.
*Stk. 3.* Limirnir verða settir fyri fýra ár í senn. Ávikavist tveir og tríggir limir verða valdir annað hvørt ár.
*Stk. 4.* Limirnir verða sitandi í nevndini til nýggir limir eru tilnevndir. Um ein limur fer frá í úrtíð situr varalimurin skeiðið út.
*Stk. 5.* Nevndin skipar seg sjálv.

**§ 9.** Uppgávurnar hjá nevndini eru:

1) At veita kunning, ráð og íkast til Brekumboðið, og soleiðis tryggja, at virksemið fevnir um viðkomandi økir.
2) At koma við tilmæli um, hvørjar uppgávur og evnir Brekumboðið kann raðfesta.
3) At gera vart við, um Brekumboðið ikki røkir sínar uppgávur og skyldur sbrt. hesi lóg.

*Stk. 2.* Nevndin hevur fund við Brekumboðið í minsta lagi fýra ferðir árliga.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann gera nærri ásetingar um virksemi og fundarskipan nevndarinnar.

*Gildiskoma*

**§ 10.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Í 2009 samtykti Føroya løgting at taka undir við sáttmálanum hjá Sameindu tjóða (ST), um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek (Breksáttmálin). Endamálið við sáttmálanum er at fremja, verja og tryggja fólki, ið bera brek, øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi fullvegis og javnbjóðis, og fremja virðingina fyri teirra viðføddu tign.

Breksáttmálin er ein ætlanaryvirlýsing, sum útgreinar karmarnar fyri, hvussu rættindi hjá fólki, ið bera brek, vera varðveitt, styrkt og ment í samfelagnum.

Fólk, ið bera brek, fevna sambært sáttmálanum um tey, sum hava varandi likamlig, sálarlig, vitborin og kenslulig mein, sum í samvirki við ymsar forðingar kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu vera við í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

Grein 33, stk. 2, í sáttmálanum áleggur limalondunum at tilnevna eina sjálvstøðuga eind, sum skal virka fyri, verja og hava eftirlit við, at ásetingarnar í sáttmálanum verða settar í gildi í innlendis lóggávu. Føroyar hevur sostatt eina altjóða skyldu til at seta á stovn eftirlit á brekøkinum.

Ymsu serfrøðinganevndirnar hjá ST hava í fleiri umførum gjørt vart við, at Føroyar ikki hava óheft eftirlit á mannarættindaøkinum, harundir á brekøkinum. Harumframt hevur MEGD heitt á landsstýrið um at skipa eitt óheft eftirlit við Breksáttmálanum, og víst á, at tørvur er á at seta eitt talsfólk á brekøkinum, ið kann ráðgeva og koma við tilmælum, sum styrkja kor teirra, ið bera brek.

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum hevur sett sær fyri, at Føroyar skulu liva upp til Breksáttmálan, og ætlar landsstýriskvinnan at betra um rættindi og kor hjá fólki, ið bera brek í Føroyum. Tí verður uppskot um at seta á stovn eitt Brekumboð lagt fyri Føroya løgting.

Á aðalfundi í 1993 samtykti ST París-meginreglurnar, ið lýsa málini fyri ein landsumfevnandi mannarættindastovn. Sambært ST er tað av týdningi, at skipað verður fyri einum óheftum stovni, sum er í tráð við París-meginreglurnar.

Brekumboðið er skipað við íblástri í ásetingunum í París-meginreglunum, ið eitt nú merkir, at umboðið hevur heimild í lóg, er fyrisitingarliga og fíggjarliga óheft av stjórnini, hevur tryggjað málsræði í lóggávu, og virkar fyri at verja mannarættindi eins og at veita frálæru í mannarættindum, í hesum føri avmarkað til brekøkið. Brekumboðið skal harumframt lata Løgtinginum, landsstýrinum og kommunufelagnum frágreiðingar og viðmerkingar á ráðgevandi grundarlagi, og virka sum brúgv millum borgarliga samfelagið og stjórnina, og millum stjórnina og altjóða samfelagið.

Brekumboðið skal virka óheft, og hava eftirlit við, at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við Breksáttmálan. Harumframt skal Brekumboðið hava ein upplýsandi leiklut viðvíkjandi rættindum hjá fólki, ið bera brek. Brekumboðið kann seta fólk í starv til skrivstovuhald, at røkja dagligu uppgávurnar saman við Brekumboðnum. Eisini kann Brekumboðið taka serligan sakkunnleika við í arbeiðið.

Brekumboðið skal hava sum aðalmál at tryggja, at røddin hjá fólki, ið bera brek, gerst týðiligari í almenna rúminum, og verður hoyrd í øllum lutum, ið ávirka umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek.

Til at veita kunning, ráð og íkast til virksemið hjá Brekumboðnum, verður sett ein nevnd, ið hevur breiða umboðan í samfelagnum, og soleiðis er við til at tryggja, at virksemið hjá Brekumboðnum fevnir um viðkomandi økir. Hetta er í tráð við París-meginreglurnar, ið áseta, at borgarliga samfelagið skal vera breitt umboðað.

Brekumboðið og Løgtingsins umboðsmaður eru í virksemi sínum óheftir av hvørjum øðrum. Umboðsmaðurin hoyrir undir Løgtingið, meðan Brekumboðið, hóast óheft, skipanarliga hoyrir undir útinnandi valdið.

Í málum, har tað er viðkomandi at vísa á manglar ella brek í lóggávuni viðvíkjandi áhugamálum hjá fólki, ið bera brek, hava bæði Løgtingsins umboðsmaður og Brekumboðið málsræðið at úttala seg. Hetta verður ikki mett at skapa trupulleikar, tí Umboðsmaðurin hevur eitt ítøkiligt eftirlit, meðan leikluturin hjá Brekumboðnum í størri mun er yvirskipað at fremja áhugamál hjá fólki, ið bera brek, í lóggávuni og samfelagnum annars.

Brekumboðið er ikki ein kærumyndugleiki, eins og Løgtingsins umboðsmaður er. Hinvegin er uppgávan hjá Brekumboðnum at vísa á, hvørji kærumøguleikar eru til taks.

**1.2. Galdandi lóggáva**

Tað er eingin mannarættindaeind ella stovnur í Føroyum, ið hevur óheft eftirlit á brekøkinum. Brekumboðið er tí ein nýggj fyriskipan, og er eingin galdandi lóggáva á økinum.

Hóast eingin mannarættindaeind ella eftirlitseind sambært Breksáttmálanum er í Føroyum, so hava vit ymiskar stovnar og felagsskapir, sum lutvíst hava eftirlit við brekøkinum.

Kærustovnurin, Javnstøðunevndin og Løgtingsins umboðsmaður eru kærumyndugleikar í málum sum viðvíkja viðurskifti hjá fólki, ið bera brek. Umframt at vera kærumyndugleiki fremur Løgtingsins umboðsmaður eftirlit við fyrisitingini, og ger í hesum sambandi eisini eftirlitskanningar. Umboðsmaðurin er politiskt óheftur, viðger klagur og fremur bert eftirlit, um viðurskifti, sum eru endaliga viðgjørd fyrisitingarliga. Í sambandi við eftirlitsvitjanir og klagumál hevur Umboðsmaðurin eisini vanliga hugt at atkomu og mismuni vegna brek, og gjørt vart við, um viðurskifti eru í tráð við Breksáttmálan.

MEGD, og áhugafeløgini á brekøkinum annars, fremja eitt ávíst eftirlit. Hetta við millum annað at vera hoyringarpartur í sambandi við lógarsmíð, og gera vart við viðurskifti, ið tey ikki meta eru nøktandi. Feløgini meta ikki, at eftirlitið á brekøkinum er nøktandi, og hevur MEGD tí í fleiri førum víst á tørvin á at skipa eitt óheft eftirlit sambært Breksáttmálanum.

Hendan løgtingslóg tekur útgangsstøði í Breksáttmálanum, sum Føroya løgting hevur tikið undir við í 2009. Sáttmálin er ikki settur í gildi við lóg, men heldur er føroysk lóggáva broytt samsvarandi sáttmálanum, har tað hevur verið neyðugt, so hon er í samsvari við ásetingarnar í sáttmálanum.

Breksáttmálin áleggur limalondunum at skipa eina eftirlitseind, sum skal virka fyri, verja og hava eftirlit við, at ásetingarnar í sáttmálanum verða settar í gildi í innlendis lóggávu.

Harumframt hava Føroyar fingið afturvendandi viðmerkingar frá ymsu serfrøðinganevndunum hjá ST um, at Føroyar ikki hava óheft eftirlit á mannarættindaøkinum, og mæla tær staðiliga til, at Føroyar seta á stovn ein mannarættindastovn sambært París meginreglunum.

Við lóggávuni verður ein tílík eftirlitseind, ið hevur eftirlit við rættindunum hjá fólki, ið bera brek, sett á stovn.

Viðvíkjandi ráðgevandi leiklutinum hjá Brekumboðnum, veita myndugleikar og stovnar í dag í ein ávísan mun ráðgeving um teirra tilboð, tænastur og virksemi, til fólk, ið bera brek. Eisini hevur Almannaverkið eina lógarásetta skyldu at veita sosialfakliga ráðgeving um, hvør hjálp kann veitast sambært almannalógini og í mun til aðra lóggávu, og skal Almannaverkið í hesum sambandi vísa á møguleikar fyri hjálp frá øðrum myndugleikum og sjálvsognarstovnum.

Tað verður tó oftani borið fram, at fólk, ið bera brek, hava trupult við at fáa greiðu á, hvar tey skulu venda sær fyri at fáa hjálp, eins og hvørji rættindi tey hava í hvørjum einstøkum føri. Við løgtingslógini verður eitt tílíkt stað sett á stovn, ið er óheft, og skal ráðgeva fólki, ið bera brek, um hvørji rættindi tey hava á øllum økjum, eins og at beina tey til rætta myndugleika, at fáa nærri leiðbeining og hjálp, í mun til ávísar tænastur, ið tey hava tørv á.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at betra um rættindi og kor hjá fólki, ið bera brek í Føroyum, og at skipa eina sjálvstøðuga eind, sum skal virka fyri, verja og hava eftirlit við, at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við Breksáttmálan.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

At landsstýrið velur at seta eitt Brekumboð á stovn, er ein nýskipan, ið styrkir rættindi og kor hjá fólki, ið bera brek, í Føroyum.

Lógaruppskotið hevur við sær, at fólk, ið bera brek, almennir myndugleikar, almennir og privatir stovnar og fyritøkur, fakfeløg og áhugafeløg, kunnu fáa ráðgeving og vegleiðing um spurningar viðvíkjandi rættindum og kærumøguleikum hjá fólki, ið bera brek, á einum staði. Eitt tílíkt stað hevur leingi verið eftirlýst, og er tað ein fyrimunur við uppskotinum, at hetta verður sett á stovn.

Brekumboðið skal hava sum aðalmál at tryggja, at røddin hjá teimum, ið bera brek, gerst týðiligari í almenna rúminum, og verður hoyrd í øllum lutum, ið eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek. Harvið hevur uppskotið tann fyrimun við sær, at røddin hjá fólki, ið bera brek, verður styrkt.

Samstundis er tað ein fyrimunur fyri rættartrygdina, hjá fólki, ið bera brek, at eitt óheft umboð verður sett á stovn, ið fer at hava eftirlit við at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við Breksáttmálan.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið er lagt alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.
Harumframt er uppskotið sent til ummælis hjá niðanfyri standandi:

Kommunufelag Føroya
Stjórnarráðunum við áheitan um at senda til viðkomandi undirliggjandi stovnar
MEGD við áheitan um at senda til limafeløgini
Heilsuhjálparafelagið
Heilsurøktarafelag Føroya
Føroya Pedagogfelag
Føroya Lærarafelag
Felagið føroyskir Sálarfrøðingar
Starvsfelagið
Fysioterapeutfelagið
Føroya Ergoterapeutfelag
Sosialráðgevarafelag Føroya
Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Landsfelag Pensjónista
Almannaverkið
Dugni
Sjóndepilin
Fountainhúsið
Dátueftirlitið
Fosturforeldrafelagið
Vinnuhúsið
Løgtingsins umboðsmaður
Føroya Kærustovnur
Javnstøðunevndin

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið av uppskotinum eru útgreinaðar niðanfyri. Lógin fer ikki at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

Mett verður, at fyri at Brekumboðið skal kunna lyfta uppgávuna á nøktandi hátt, er neyðugt við umsiting, ið fevnir um ein stjóra, ið eisini verður kallaður Brekumboðið, og einum samskipara, ið møguliga eisini kann virka sum skrivstovufólk. Brekumboðið skal hava sjálvstøðuga játtan á fíggjarlógini. Mett verður at samlaðu lønarútreiðslurnar verða ímillum 1,3 og 1,5 mió. kr.

Mett verður neyðugt, at Brekumboðið hevur eina játtan til at framleiða kunningartilfar, gera frágreiðingar og kanningar um viðurskifti hjá fólki, ið bera brek, at keypa serkunnleika eftir tørvi, eins og til ferðakostnað, ið ger tað møguligt hjá Brekumboðnum at luttaka í eitt nú ST-fundum og á norðurlendskum fundum, sum eru viðkomandi fyri arbeiðið hjá Brekumboðnum. Harumframt verða útreiðslur til skrivstovuhald.

Umframt Brekumboðið verður sett ein nevnd fyri Brekumboðið. Nevndin hevur fimm limir, sum hevur minst fýra fundir árliga. Nevndin fær fundarpengar sambært Umfarsskriv um nevndarsamsýningar hjá Fíggjarmálaráðnum, umframt koyripengar, alt eftir hvar limirnir búgva. Til hetta krevst ein árlig játtan áljóðandi 30 tús. kr.

Umframt árliga kostnaðin av Brekumboðnum, verður mett neyðugt at játta 250 tús. kr. til eingangsútreiðslur á komandi fíggjarlóg, til at menna eina heimasíðu, ið er atkomulig fyri øll fólk, ið bera brek, eins og til keyp av innbúgv.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Brekumboðið er ein nýggj fyriskipan, ið skipanarliga hoyrir undir landið. Harvið er Brekumboðið ein umsitingarlig avleiðing í sær sjálvum. Væntast kann at Brekumboðið fer at seta spurningar til myndugleikar at svara, eins og at koma við áheitanum um ávíst, ið viðmælt verður at arbeiða við.

Brekumboðið áleggur ikki landinum og kommununum uppgávur, ið hava umsitingarligar avleiðingar við sær. Tó er neyðugt hjá landi og kommunum at fyrihalda seg til frágreiðingar, tilmæli og annað frá Brekumboðnum.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri fólk, ið bera brek við tað at endamálið við uppskotinum er at betra um teirra rættindi og kor, eins og at virka fyri, verja og hava eftirlit við, at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við Breksáttmálan.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið hevur jaligar avleiðingar, við tað at mannarættindi hjá fólki, ið bera brek, verða styrkt.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið hevur jaligar avleiðingar. Sambært § 33. stk 2. í sáttmálanum skulu limalondini tilnevna eina sjálvstøðuga eind, sum skal virka fyri, verja og hava eftirlit við, at ásetingarnar í sáttmálanum verða settar í gildið í innlendis lóggávu.

   Við hesari lóg verður eitt Brekumboð sett á stovn, sum skal virka fyri, verja og hava eftirlit við, at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

   Við hesum uppskoti liva Føroyar harvið upp til sína altjóða skyldu at seta á stovn eftirlit á brekøkinum.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Landsstýrismaðurin fær heimild til at seta Brekumboðið í starv og loysa Brekumboðið úr starvi.

Somuleiðis fær landsstýrismaðurin heimild til at seta nevndina fyri Brekumboðið, eftir tilmæli, og at gera nærri ásetingar um virksemi og fundarskipan nevndarinnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Brekumboðið hevur ein upplýsandi leiklut, og fer í sínum virksemi at vísa á í hvønn mun rættindi og lívsumstøður hjá fólki, ið bera brek, eru nøktandi. Mett verður at hetta kann stuðla upp undir at batar vera framdir, og á tann hátt er Brekumboðið við til at stuðla undir tey 17 Heimsmálini hjá ST fyri burðadyggari menning.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Lógin gevur landsstýrismanninum heimild til at seta á stovn eitt Brekumboð, ið skal virka fyri at styrkja rættindi og áhugamál hjá fólki, ið bera brek, í Føroyum.

*Til § 1, stk. 2*
Limirnir í nevndini eru valdir fyri at ráðgeva Brekumboðnum um tað økið tey umboða, og harvið tryggja, at virksemið hjá Brekumboðnum hevur eina breiða umboðan í samfelagnum. Talan er um eina breiða umboðan av sjónarmiðum, og skulu limirnir ikki umboða møgulig sjónarmið hjá t.d. egnum arbeiðsgevara ella avvarðandi myndugleikaøki.

*Til § 1, stk. 3*
Fyri at kunna røkja uppgávuna til fulnar er ásett, at Brekumboðið er óheft í virksemi sínum. Hetta merkir, at Brekumboðið er sett av landsstýrismanninum, men burtursæð frá hesum hevur landsstýrismaðurin ella annar almennur myndugleiki onga ávirkan á virksemi. Talan er sostatt um ein sjálvstøðugan almennan myndugleika, sum er fevndur av fyrisitingarlógini, og sum harvið eisini er undir eftirliti hjá Løgtingsins umboðsmanni.

Óheftni skal m.a. vera við til at tryggja, at Brekumboðið kann tala at, tá ið umboðið metur at viðurskifti ikki eru nøktandi, og vísa á manglar, uttan at hetta fær ávirkan á starvið.

**Til § 2**
Orðingin merkir, at eingin kann átala Brekumboðið ella avmarkað hansara talufrælsi, tá ið talan er um viðurskifti, sum eru viðkomandi fyri umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek. Sum dømi kann nevnast, at Brekumboðið kann havast at politisku skipanini ella almennum myndugleikum, uttan at tað fær avleiðingar fyri hansara starv.

*Til § 2, stk. 2 og stk. 3.*
Um Brekumboðið kemur fram á viðurskifti hjá einstaklingum, sum ikki eru í lagi, kann Brekumboðið ikki viðgera einstaka málið ella taka nakra avgerð hesum viðvíkjandi. Í tílíkum førum kann Brekumboðið velja at kanna hesi viðurskifti yvirskipað. Um trupulleikin vísir seg at vera gjøgnumgangandi, kann Brekumboðið úttala seg á ein yvirskipaðan hátt uttan at úttala seg um einkulta málið.

**Til § 3**
Uppgávurnar, ið eru ásettar í hesari grein, skulu skiljast breitt, og virkisøkið skal fevna um øll viðurskifti, sum viðkoma fólki, ið bera brek, sum t.d. sosial-, bústaðar-, fíggjarlig-, heilsu-, útbúgvingar-, arbeiðs-, og mentanarlig viðurskifti. Eisini skal atlit takast til atkomu í breiðastu merking, harundir fysiska og talgilda atkomu við meira.

*Til § 3, stk. 1, nr. 1*
Hetta er ein uppgáva, sum er sprottin úr § 33, stk. 2 í Breksáttmálanum. Brekumboðið ger hetta m.a. við at vera hoyringarpartur í øllum lógarsmíði, sum verður sent til ummælis og eru

viðkomandi fyri økið. Eisini er uppgávan at vísa á alment, hvørji viðurskifti virka, hvørji tørva ábøtur og hvørji rættindi mangla í Føroyum.

*Til § 3, stk. 1, nr. 2*
Uppgávan hjá Brekumboðnum er í hesum sambandi at tryggja, at fólk, ið bera brek, kunnu fáa upplýsingar um teirra rættindi og kærumøguleikar á einum staði, eins og at tryggja, at kunningartilfar um rættindi og kærumøguleikar er sjónligt og atkomuligt. Sum dømi kann nevnast, at Brekumboðið hevur eina heimasíðu og annað upplýsandi tilfar, ið greitt lýsir, hvørji rættindi fólk, ið bera brek, hava og hvønn tey kunnu kæra til í hvørjum einstøkum føri. Eisini skulu fólk, ið bera brek, kunna venda sær til Brekumboðið fyri at fáa ráð og vegleiðing um teir spurningar og ivamál, sum tey hava, hesum viðvíkjandi. Tað er umráðandi at tryggja, at atkoman til upplýsingar er so góð sum til ber, og kann hetta eitt nú gerast við, at tilfarið á heimasíðuni verður lisið upp og teknmálstulka.

*Til § 3, stk. 1, nr. 3*
Brekumboðið kann fara út til almennar myndugleikar, almennar og privatar stovnar og fyritøkur, fakfeløg og áhugafeløg, at kunna um rættindi, kærumøguleikar og vegleiða tey um, hvussu tey kunnu tryggja rættindini hjá teimum, ið bera brek, eins og um viðurskifti, sum tey ynskja at fáa í rættlag. Sum dømi kann nevnast, at arbeiðspláss og fyriskiparar av tiltøkum kunnu fáa ráð og vegleiðing, um hvussu tey tryggja atkomu.

*Til § 3, stk. 1, nr. 4*
Brekumboðið kann eitt nú vera við til at skipa fyri ráðstevnum og øðrum kunningarátøkum, eins og fara út á skúlar og lærustovnar at veita frálæru við tí fyri eyga at virka fyri, at samfelagið er upplýst og betur rúmar fólki, ið bera brek.

*Til § 3, stk. 1, nr. 5*
Brekumboðið hevur til uppgávu at fylgja við í almennum viðurskiftum og umstøðum hjá fólki, ið bera brek, í Føroyum.

Tað er uppgávan hjá Brekumboðnum, at savna saman vitan um, hvussu umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek, eru í Føroyum, og um hetta er í tráð Breksáttmálan og innlendis lóggávu. Eisini er tað uppgávan hjá Brekumboðnum at tosa søk teirra í hesum sambandi. Fyri at á besta hátt at røkka hesum endamáli, kann Brekumboðið biðja um at sleppa at vitja stovnar og støð, har fólk, ið bera brek eru, ella við at biðja almennar myndugleikar um at lýsa teirra politisku avgerðir og fyrisitingarligu siðvenjur á teimum økjum, sum hoyra til myndugleikan.

Umráðandi er, at Brekumboðið fær kunning um viðurskifti hjá fólki, ið bera brek.
Brekumboðið kann heita á stovnar, feløg, virkir og onnur, ið hava samband við fólk, ið bera brek, í teirra virksemi, um at fáa upplýsingar, ið lýsa teirra virkið. Eisini kann Brekumboðið biðja um upplýsingar, ið metast at vera viðkomandi í mun til rættindi og viðurskifti hjá fólki, ið bera brek.

Brekumboðið kann biðja um, at sleppa at tosa við tey, sum fáa tænastu. Endamálið er einans at savna saman vitan um tey, ið bera brek og teirra umstøður. Tann vitanin, sum Brekumboðið fær, kann einans nýtast yvirskipað fyri at lýsa korini hjá fólki, ið bera brek. Brekumboðið er ikki ein eftirlitsmyndugleiki í mun til ávísar stovnar og einstaklingar, men skal einans savna vitan um yvirskipaði viðurskifti.

Um Brekumboðið, í sambandi við vitjanir, kemur fram á órógvandi viðurskifti, skal fráboðan um hetta latast víðari til rætta myndugleika. Um Brekumboðið verður noktað at koma á vitjan, kann Brekumboðið umhugsa at venda sær til avvarðandi myndugleika fyri at fáa eina meting av, hvørt noktanin gevur høvið til stúran.

Brekumboðið kann gera frágreiðingar og kanningar. Hesar kunnu gerast í samstarvi við Fróðskaparsetrið, Hagstovuna ella aðrar viðkomandi partar.

*Til § 3, stk. 1, nr. 6*
Sum ein liður í at gera røddina hjá fólki, ið bera brek, týðiliga í almenna rúminum, er tað neyðugt at Brekumboðið er sjónligt m.a. á sosialum miðlum, og kann traðka fram í fjølmiðlunum. Brekumboðið skal av sínum eintingum taka upp spurningar og viðurskifti, sum umboðið metir er viðkomandi, og á henda hátt varpa ljós á viðurskifti, sum tørvur er á, og á viðurskifti, sum krevja ábøtur.

Brekumboðið kann eisini stuðla undir, at fólk, ið bera brek, sjálvi koma til orðanna í m.a. kjaki, og stuðla undir, at fólk, ið bera brek, verða spurd um viðurskifti, sum viðkoma teimum.

*Til § 3, stk. 2.*
Brekumboðið skal í øllum sínum virksemi í størst møguligan mun, hoyra fólk, ið bera brek. Hetta kann Brekumboðið m.a. gera við at tosa við fólkini sjálvi eins væl og áhugafeløg á brekøkinum, t.e. limafeløgini í MEGD, og áhugafeløg annars, ið umboða fólk, ið bera brek. Brekumboðið kann eitt nú hoyra hesi við at fara á vitjanir ella bjóða teimum á fundir um ymisk evnið.

Nøkur fólk, ið bera brek, hava avbjóðingar við eitt nú at hoyra, tosa, minnast, skriva og lesa. Í teimum førum er neyðugt, at Brekumboðið tryggjar, at tey eisini verða hoyrd við m.a. at nýta aðrar samskiftishættir, tulk, eins og at tosa við starvsfólk og avvarðandi, sum eru um fólkini.

**Til § 4**
Brekumboðið er hoyringarpartur, tá ið landsstýrið sendir lógaruppskot ella kunngerðir til hoyringar. Eisini kann Brekumboðið koma inn til hoyringarfundir, og løgtingið og landsstýrið kunnu ráðføra seg hjá Brekumboðnum í sambandi við lógarsmíð og tílíkt.

**Til § 5**
Frágreiðingin skal lýsa virksemi hjá Brekumboðnum fyri farna árið, harundir hvat Brekumboðið hevur arbeitt við, og á hvønn hátt, harundir fokusøkir, vitjanir, úrslit og niðurstøður.

**Til § 6**
Sum ein liður í at tryggja óheftnið verður starvið sum Brekumboð lýst leyst.
Dentur verður lagdur á, at Brekumboðið hevur neyðugan førleika til at røkja starvið, bæði fakliga og persónliga. Orsøkin til at starvssetanin er í fimm ár í senn við møguleika til at sita í átta ár, er bæði at tryggja óheftnið, tí setanin ikki fylgir einum valskeiði og tí mett verður, at ein fimm ára setan somuleiðis gevur tí, sum settur verður, tíð til at uppbyggja stovnin, og at seta seg væl inn í arbeiðsøkið. Setanin kann leingjast í upp til átta ár uttan at lýsa starvið leyst

av nýggjum. Nevndin fyri Brekumboðið skal hoyrast, áðrenn støða verður tikin til at leingja setanina.

*Til § 6, stk. 2*
Brekumboðið skal hava fakligan serkunnleika um lógir og skipanir og góðan kunnleika til viðurskifti sum eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek í síni heild. Brekumboðið skal halda eyga við, at lóggáva, tænastur og tilboð, sum viðvíkur fólki, ið bera brek, eru í samsvari við Breksáttmálan.
Brekumboðið skal hava útbúgving á kandidatstøði ella líknandi. Tað er ikki ein treyt at Brekumboðið er løgfrøðingur.

*Til § 6, stk. 3*
Ásetingin í stk. 3 skal tryggja, at Brekumboðið er politiskt óheft. Tað er tí greitt ásett í lógini, undir hvørjum treytum Brekumboðið kann verða loyst úr starvi. Avgerð um at loysa Brekumboðið úr starvi kann ikki kærast til annan fyrisitingarmyndugleika. Verður Brekumboðið loyst úr starvi, verður starvið lýst leyst av nýggjum. Brekumboðið kann ikki verða loyst úr starvi av øðrum orsøkum, enn ásett í § 2, stk. 3, nr. 1-3.

*Til § 6, stk. 3, nr. 1*
Tað skal vera skjalprógvað við fleiri ítøkiligum dømum, at Brekumboðið vanrøkir uppgávurnar sambært hesi lóg. Einstakir álvarsligir feilir kunnu eisini vísa, at Brekumboðið ikki hevur neyðuga førleikan at røkja uppgávuna.

Um Brekumboðið t.d. javnan og uttan haldgóða grund ikki møtir á fundi við nevndina fyri Brekumboðið, er hetta at meta sum vanrøkt av starvinum.

Brekumboðið kann bert sigast úr starvi, tá ið talan er um eina slíka vanrøkt ella álvarsligar ella endurtiknar feilir, sum gera, at Brekumboðið frameftir ikki kann røkja uppgávu sína á forsvarligan hátt.

*Til § 6, stk. 3, nr. 2*
Sum dømi um atburð, sum týðiliga minkar um álitið á, at Brekumboðið kann røkja uppgávur sínar á fullgóðan hátt, kann nevnast, at Brekumboðið fær dóm fyri brot á revsilógina, t.d. fíggjarligan kriminalitet ella harðskap. Annað dømi kann vera, at Brekumboðið misnýtir sína játtan ella misnýtir sítt starv til egnan ella annans vinning. Somuleiðis vil tað minka munandi um álitið á skipanina og førleikan at røkja uppgávuna, um Brekumboðið møtir til arbeiðis í ávirkað/ur.

*Til § 6, stk. 3, nr. 3*
Um nevndin metir at Brekumboðið vanrøkir uppgávurnar ella ber seg at á ein hátt, sum týðiliga minkar um álitið á at Brekumboðið kann røkja sínar uppgávur til fulnar, kann nevndin mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi. Talan er um eitt skrivligt tilmæli við grundgevingum, sum er undirskrivað av minst trimum av teimum fimm limunum í nevndini fyri Brekumboðið. Tað er ein treyt fyri uppsøgn, at landsstýrismaðurin kannar um hald er i uppáhaldunum frá nevndarlimunum.

*Til § 6, stk. 4*
Landsstýrismaðurin skal kanna um treytirnar fyri uppsøgn eru uppfyltar áðrenn Brekumboðið verður loyst úr starvi.

**Til § 7**
*Til § 7, stk. 1 og stk. 2.*
Brekumboðið er setanarmyndugleiki og avgerð sjálvt, hvønn fakligan kunnleika tørvur er á, hvørjar uppgávur skrivstovan røkir, eins og um fólk verða sett í starv ella vitan verður keypt uttan í frá, tó innanfyri verandi játtan.

*Til § 7, stk. 3.*
Sum dømi um serkunnleika kann nevnast byggifrøðingar, kt-serfrøðingar, námsfrøðingar o.s.fr.

**Til § 8**
*Til § 8, stk. 1 og stk. 2.*
Tað er landsstýrismaðurin á økinum, sum heitir á áhugafeløg, løntakarar, arbeiðsgevarar, almanna-, heilsu-, skúla-, dagstovna- og eldraøkið og frítíðarvirksemi um at koma við tilmæli til, hvør skal sita í nevndini fyri Brekumboðið. Hesi skulu helst tilmæla fýra fólk hvør, sum tey meta eru skikkaði til at umboða teirra økið. Av hesum fýra verður valt eitt umboð og eitt varaumboð.

Áhugafeløgini á brekøkinum fevnir um limafeløgini í MEGD og áhugafeløg annars, ið umboða bólk, ið bera brek. Løntakarar eru fakfeløgini á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Arbeiðsgevararnir eru somuleiðis bæði fyri privata og almenna geiran. Almannaøkið er Almannaverkið, onnur ið veita tænastur sambært lóggávu á almannaøkinum, og aðrir stovnar undir Almanna- og mentamálaráðnum, ið virka innan almannaøkið. Heilsuøkið er Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd, Fólkaheilsustýrið og aðrir stovnar undir Heilsumálaráðnum, ið virka innan heilsuøkið. Skúlaøkið er fólkaskúlar, miðnámsskúlar, Fróðskaparsetrið og aðrir stovnar undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, ið virka á skúlaøkinum. Dagstovnaøkið er vøggustovur, barnagarðar og onnur ið virka sambært lóggávu á dagstovnaøkinum. Eldraøkið eru starvsfólk, eldraráð, pensjónistafeløg, og onnur ið virka sambært lóggávu á eldraøkinum. Tey, sum kunnu umboða frítíðarvirksemi eru limir í Ítróttarsambandi Føroya og feløg annars, ið hava frítíðarvirksemi.

Tey, sum vera tilnevnd í nevndina fyri Brekumboðið skulu hava ein breiðan kunnleika um teirra økið, eins og um viðurskifti sum eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek, og skulu vera før fyri at ráðgeva Brekumboðnum. Best er, um limirnir hava arbeitt ella arbeiða við fólkið, ið bera brek.

Fyri at landsstýrisfólkið skal kunna taka avgerð á upplýstum grundarlagi, skal útbúgving, førleikar og viðkomandi royndir lýsast, tá ið tilnevnt verður, eins og í hvønn mun tey, ið mælt verður til, hava innlit í samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri nevndarinnar virki.

*Til § 8, stk. 3 -5*
Fyri at tryggja kontinuitet í nevndini, verður øll nevndin ikki skift út samstundis. Allir limir sita í fýra ár, men ávikavist tveir og tríggir limir standa fyri vali annaðhvørt ár. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og skrivara.

**Til § 9**
Nevndin er samansett av fólki, sum hava eina breiða samfelagsumboðan og, sum hava eina vitan um tey økir í samfelagnum, har fólk, ið bera brek, virka og skulu rúmast. Nevndin hjálpir

Brekumboðnum, at finna fram til, hvørji fokusøkir og átøk skulu raðfestast í virkseminum, og at leggja hetta til rættis á ein slíkan hátt, at endamálið kann røkkast. Hetta er ein natúrlig uppgáva hjá nevndini, við tað at Brekumboðið einsamalt ikki kann hava serkunnleika á øllum økjum, ið viðkoma fólki, ið bera brek. Tí skal nevndin veita kunning og ráðgeving til Brekumboðið eins og at hesin kann venda sær til einstøku limirnir, tá ið tørvur er á tí.

Ráðið skal virka, sum eitt serligt netverk hjá Brekumboðnum. Brekumboðið kemur við sínum egnu úttalilsum og hevur ábyrgdina av sínum virksemi. Tað er Brekumboðið, sum myndar stovnin alment. Brekumboðið kann ráðføra seg við nevndina, áðrenn støða verður tikin til serligar trupulleikar ella prinsippiel mál.

Nevndin skal samstundis, sum hon er sparringspartnari hjá Brekumboðnum, eisini halda eyga við, at Brekumboðið røkir sínar uppgávur og skyldur. Hetta ger nevndin m.a. við at hava fundir við Brekumboðið í minsta lagi fýra ferðir um árið.

Nevndin kann eisini biðja um kunning frá Brekumboðnum uttan um fundirnir og ársfrágreiðingina. Um nevndin verður varug við, at Brekumboðið ikki røkir sínar uppgávur og skyldur, skal kunnað landsstýrismannin um hetta.

**Til § 10**
Lagt verður upp til, at fyrireikingin av Brekumboðnum kann fara í gongd í 2023, t.e. at tilnevna nevndina fyri Brekumboðið, seta Brekumboðið í starv og fáa skrivstovuna at virka, soleiðis at klárt er av álvara at fara til verka 1. januar 2024.

Almanna- og mentamálaráðið, 10. mai 2023

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Sáttmáli Sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.